# Nóg mikið er av fiskakassum

**Tá ið fiskurin var mestur í síðstu viku, og trupulleikarnir hjá landingarmiðstøðunum vóru størstir vegna kassatrot, hevði Kassamiðstøðin 35.000 kassar eftir á goymslu, sigur Kári í Garði**

KASSATRUPULLEIKIN
*Vilmund Jacobsen*



*- Fiskamarknaður Føroya átti heldur at fyrireikað seg til støðuna og verið við til at loyst trupulleikarnar enn bert at funnist at, heldur Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini. Í Útvarpinum í mánakvøldið segði John Nielsen, stjóri á Fiskamarknaðinum, at tey fara at skipa so fyri, at allur fiskur verður skildur.*

Kári í Garði, stjóri á Kassamiðstøðini á Toftum, er sannførdur um, at trupulleikin við kassum, sum verið hevur í langa tíð, stendst ikki av, at ov fáir kassar eru í skipanini hjá Kassamiðstøðini.

- Hóast fiskiskapurin er vaksin sera nógv seinastu árini, og ein veksandi partur av fiskinum fer heilur av landinum, hevur Kassamiðstøðin megnað at havt kassar tøkar, sigur stjórin, sum hevur sent fjølmiðlunum eitt skriv um hesi viðurskifti.

Hann vísir á, at í seinastu viku stóðst mikið rok av, at ov fáir fiskakassar skuldu vera, og at útróðrarfiskur sostatt mátti seljast óskyldur – við tí úrsliti, at prísurin lækkaði.

- Men tá ið mest fiskur kom uppá land hesar dagar, hevði Kassamiðstøðin 35.000 kassar eftir á goymslu.

Tí er tað ikki rætt, sigur Kári í Garði, tá ið Fiskamarknaður Føroya førir fram, at neyðugt var at selja útróðrarfisk óskildan vegna kassatrot.

### Hvar er trupulleikin?

- Fiskamarknaður Føroya hevur seinasta árið gjørt íløgur í stór skiljibond, bæði í Klaksvík og á Toftum. Sum skilst, kunnu hesi skilja 8 kassar um minuttin í part ella 1.000 tons um samdøgnið - í smáar kassar. Kári heldur, at um hetta ikki er nóg mikið, standa nógv skiljibond runt á virkjunum, sum uttan iva kunnu leigast, tá ið ástendur.

- Kassarnar skal Kassamiðstøðin koma við, leggur stjórin dent á og spyr, hvar trupulleikin er??

Kári í Garði heldur, at tað hevði verið meira hóskandi hjá Fiskamarknaði Føroya at fyrireikað seg til støðuna og verið við at loyst uppgávuna – heldur enn bara at koma við atfinningum.

### 250.000 kassar

Í skrivinum, vísir stjórin á, at Kassamiðstøðin er eitt partafelag, sum er stovnað av vinnuni í 1995. Endamálið er at hava tøkar fiskakassar til fiskivinnuna, og at halda hesar viðlíka.

- Síðan byrjanina, hava vit keypt 250.000 kassar fyri 56 milj. krónur, og bert seinasta árið eru keyptir 50.000 kassar fyri 16 milj. krónur, sigur Kári í Garði.

# Um 10 ár framleiða norðmenn 100.000 tons av aldum toski

**Hetta er líka nógv, sum øll botnfiskaveiðan undir Føroyum. Ein kanning vísir, at bæði norskir, svenskir og bretskir brúkarar eru positivir mótvegis aldum toski, men teir vilja treyðugt gjalda líka nógv fyri alda fiskin sum fyri tann villa**

TOSKAALING
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri skrivaðu vit, at eitt felag í Noregi, Villa Cod Farm, sum fæst við toskaaling, hevði fingið í miðal 43 norskar krónur fyri kilo av aldum toski. Hetta vóru 12 tons av avhøvdaðum og ísaðum fiski, sum fór til keyparar í Fraklandi.

Sum skilst í Noregi, eru stórar vónir til toskaalingina. Gongst, sum ætlað, fara norðmenn helst at selja eini 100.000 tons av aldum toski um árið um eini tíggju ár. Tað er líka nógv, sum øll botnfiskaveiðan undir Føroyum í eitt heilt ár!

Í Bretlandi, har tey so smátt eisini eru farin undir at ala tosk, vænta tey, at stórur marknaður er fyri alda toskinum. Ivi er tó um prísin – og hvussu væl tað í framtíðini fer at loysa seg at ala tosk.

Norðmenn fegnast um góðu søluútlitini fyri aldum toski í Bretlandi.

### Brúkarar positivir

Í Bretlandi hava tey nú einar 4-5 smoltstøðir til tosk og tvey alibrúk. Mett verður, at fyrstu toskarnir verða sendir á marknaðin í 2005-2006. Helst verður talan bara um eini 400 tons av aldum fiski tað fyrsta árið, men bretar vænta, at talið verður tvífaldað longu árið eftir, at fyrstu aldu toskarnir eru sendir á marknaðin.

Ein kanning vísir, at bæði norskir, svenskir og bretskir brúkarar eru positivir mótvegis aldum toski, men teir vilja treyðugt gjalda líka nógv fyri henda fiskin sum fyri tann villa.

Minsti prísurin fyri villan, avhøvdaðan tosk hjá norska ráfiskafelagnum er í løtuni 15 norskar krónur fyri kg.

Hevði hesin fiskurin verið aldur, hevði kiloprísurin bara rokkið til kostnaðin av smolti, fóðuri og arbeiðslønir.



*Villi toskurin er hóttur. Tí eru brúkarar í Noregi, Svøríki og Bretlandi positivir mótvegis alda toskinum*

### Feskleiki og dygd

Bretar ugga tó norðmenn við at siga, at ymisku handilsketurnar í Bretlandi eisini geva ymiskar prísir fyri vøruna. Í Marks & Spenser kostar eitt kilo av toski 13 pund, meðan prísurin er eini trý pund lægri, har fiskurin er bíligast.

- Tí er tað týdningarmikið, hvønn marknað tú vendir tær til. Toskurin er fyri almenningin, og villi toskurin er hóttur. Hetta merkir, at tørvur eisini verður á aldum fiski.

Bretskur fiskakeypari sigur, at teir, sum ala og selja tosk, eiga at leggja dent á trygga leveransu, feskleika og góðan fisk.

- Tá fara keypararnir at síggja, hvussu týdningarmikil hesin fiskur er, sigur bretskur fiskakeypari.

# Trolarar fullir av upsa

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin keypti Fiskavirking í Saltangará upsan hjá partrolarunum, Smaragd og Safir. Báðir vóru fullir. Veiðan hjá skipunum vá eini 200.000-220.000 pund tilsamans. Av hesum var eini 170.000 pund upsi. Restin var hvítur fiskur.

Tá ið mánadagurin byrjaði, hevði Fiskavirking í Saltangará eini 80.000-90.000 pund niðurfyri frá vikuni fyri.

Jaspis og Ametyst landaðu nevniliga síðsta hósdag. Teir vóru aftur hesaferð fullir undir líkurnar, eini 220.000 pund tilsamans. Meginparturin av veiðini var upsi, eini 180.000 pund, sum virkið í Saltangará keypti.

Skipini høvdu eisini nakað av hvítum fiski, sum onnur virki keyptu.

Í Saltangará siga tey seg hava nóg mikið av fiski fram til hósdagin.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kristina Jespersen í Hvalba 85 ár

Í dag, 26. mars, verður Kristina Jespersen í Hvalba 85 ár. Foreldrini vóru Mikkalina og Niels Pauli Norðberg. Hon er elst av 11 systkjum, har eftir á lívi eru Archibald, Evald, Dánjal, Jacob og tvíburarnir Kári og Róald. Tey fýra, sum farin eru, eru Niman, Karin Jens og Óli. Sum ung arbeiddi Kristina í fiski í Vági, og hon tænti eisini eitt skifti hjá bóndahjúnunum í Kirkjubø. Í 1946 giftist hon við Høgna Jespersen, sum eisini var úr Hvalba. Saman høvdu tey handil, til Høgni doyði í 1986, 68 ára gamal. Kristina átti fimm børn, tvær døtur eru í Havn og ein sonur í Hvalba. Hini bæði eru deyð. Í dag, føðingardagin, verður Kristina at hitta heima frá klokkan 11–16.



*Kristina saman við yngsta ta ommusoninum, Jónas*



*Ingi Justinussen, formaður í Føroya Ellisakførum*

## Føroya Elliskafør aðalfund

Leygardagin 22. mars hevði áhugafelagið Føroya Ellisakfør aðalfund í felagshølunum Yviri við Strond 22. Áðrenn aðalfundin sá nevndin soleiðis út: Ingi Justinussen formaður, John William Old næstformaður, Jens Reinert skrivari, Hans Jørn Nielsen kassameistari, Jóhan Beder nevndarlimur,

Júst Sivertsen og Helgi Magnusarson eykalimir. Fyri vali stóðu Jens Reinert og John William Old. Jens Reinert bar seg undan, og í hansara stað bleiv Rúni Nielsen valdur.

## Sjálvstýrisflokkur in nýggjan landsfelagsskrivara

6. februar varð Jónas Johnsson valdur til skrivara í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins, har hann eisini er varalimur fyri umboðið úr Suðurstreymi, Ásu Olsen, ið er næstformaður floksins. Hann er eisini næstformaður í Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag, stýrislimur í ALV, kontaktpersónur fyri fysioterapeautar í praksis, nevndarlimur í Fysioterapeutfelag Føroya, umboð fyri Føroyar í umboðsráðnum hjá Danske Fysioterapeuter og varalimur í sama felag.

Jónas er føddur í Reykjavík 20. apríl 1949, sonur Hallgerð og John Sivertsen. Hann er næstur av seks brøðrum. Jónas er útbúgvin fysioterapeutur og rekur sína egnu fysioterapistovu í Kollafirði, har hann saman við familjuni hevur búð seinastu 23 árini. Hann giftist í 1977 og eigur eina dóttir og ein son.

Foreldrini hjá Jónas vuksu bæði upp við Gjógv, tó at móðurættin er av Eiði. Foreldrini hjá Hallgerð, Kristianna og Jóhan Kallsoy, búðu 25 ár við Gjógv, har Jóhan var lærari. Hann var eisini løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin í nógv ár. Hin abbin var Kristjan á Fløtti (Sivertsen), skipari, og omman var Andrea, sum livdi til hon bleiv 101 ára gomul.

Hóast Jónas búði í Havn sum ungur, búði hann við Gjógv skúlaárið 1958-59. Tá upplivdi hann bygdasamfelagið sum tað var tá. Skúladagurin byrjaði við at reka kúnna av básinum í kjallaranum, ígjøgnum bygdina, niðan eftir geilini og um garðaliðið. Tá galt eisini nógv um at stíga uttanum nógvu mykjuna. Har var ein serligur roykur allastaðni, sum nú er horvin. Ferðasamband við bygdina var tvær ferðir um vikuna – um tað viðraði. Til dømis komu Smiril og Brittons Pride. "Lítli Hvíti" hjá Stóra Peturi førdi fólk og farm í land, fullfermdur til stokkin, ofta sleipandi tunnur við petroleumi og øðrum. Síðan var hivað, lorað og borið úr gjónni. Men fólk høvdu tað sera gott, sæð úr barnaeygum. Jónas hevur eisini aðrar royndir, sum t.d. sjómaður, postmaður, húsasmiður, múrari og sum barnaverndarlimur.

**JH**



### 85 ár

Í dag, 26. mars, verður Kristina Jespersen, Hvalba, 85 ár. Hon verður at hitta heima frá kl. 11.00 til 16.00.

### 80 ár

Í dag, 26. mars, verður Esther Davidsen, Æðuvík, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini í Æðuvík kl. 20.30.

## Dagurin

26. mars. Gabriel. Beint eftir mariumessu er nevndur høvuðseingilin Gabriel, sum bar tey góðu tíðindi. Navnið merkir guðsmaður.

www.e-conomic.fo:

# Nýskapan innan bókhald

**Fullfíggjað bókhaldsskipan á alnetinum ger bókhald lættari**

BÚSKAPUR
*Tíðindi frá Kervinum*

Á www.e-conomic.fo hava øll atgongd til eina sera snildisliga skipan, sum kann brúkast uttan mun til, hvar í heiminum ein er staddur, bara ein hevur atgongd til alnetið. E-conomic er ein nýskapan, sum vísir at føroyskar fyritøkur eisini kunnu verða við í fremstu røð, tá talan er um at gagnnýta nýggjastu tøknina.

### Sera brúkaravinarlig

Skipanin, sum er ment av grannskoðarum og reklamufólki í Danmark, við føroyskum samstarvi. Stórt arbeiði er lagt í at gera skipanina so einfalda at brúka sum gjørligt, og hon verður mett sum tann besta og mest feilfría skipanin á marknaðinum. Skipanin er ummæld í bløðum sum PC World og Alt om Net, og fær sera góð skoðsmál.

E-conomic er heildarloysn, har kundin rindar eitt mánaðargjald fyri nýtslu av skipanini. Kervi spf. rekur skipanina, undir sera tryggum viðurskiftum. Skipanin er gjørd við SSL-tøkni eins og netbankar. Raksturin fer fram undir tryggum og skipaðum viðurskiftum undir eftirliti av grannskoðarum.

### Nýggir møguleikar

Internetbókhald við E-conomic gevur nógvar møguleikar í mun til vanligar bókhaldsskipanir.

Við E-conomic ber til at býta arbeiðið sundur, og lata fleiri fólk hava atgongd til hvønn sín part av bókhaldsskipanini, til dømis lata sølufólk sjálv fakturera, bókhaldaran bóka. Stjórin hevur altíð eitt dagført yvirlit og granskoðarin kann hava regluligt eftirlit, alt í somu skipan, uttan mun til tíð og stað

E-conomic er fullfíggjað við øll tí sum hoyrir til finans-, debitor-, kreditor- og prosjektbókhald. Eisini er elektronisk innskanning av skjølum og beinleiðis samskifti við MS-Excel.

### Royni sjálvi

Til ber at skráseta seg sum brúkara og at royna skipanina ókeypis. Er ein nøgdur aftan á royndina, so kann ein skráseta hald fyri einans úr 195 krónum um mánaðin.

Kervi spf. býður e-conomic út í Føroyum, og hevur øll rættindi til skipanina.